# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Hyggið at Berlin, har søgan prógvaði, at eingin avbjóðing er ov stór til ein heim, ið stendur saman*
*Barrack Obama*

# Trý ára gamla Zoe kvaldist í bilinum hjá pápa sínum

**Hesa vikuna eru tvey smábørn deyð í Fraklandi, tí foreldrini lótu tey sita í tí bilinum í teirri bakandi sólini**


*Tað var á hesum parerkingsplássinum, at lítla Zoe sat í bilinum hjá pápa sínum*
*Mynd: AFP*

Tann 38 ára gamli pápin hevði júst verið í barnagarðinum við sínum fimm ára gamla soni, tá hann setti bilin í miðbýnum í Saint-Marcel. Tað trý ára gomlu Zoe lat hann sita eftir í bilinum. Eftir ætlanini skuldi hann fara til eina dagrøktarmammu við lítlu Zoe, men av einari ella aðrari grund gloymdi hann tað og fór til arbeiðis á einari verksmiðju, har hann hevði eitt deildarleiðarastarv. Zoe sat eftir á baksetrinum í bilinum, og tá pápin kom aftur til bilin seinnapartin, var gentan deyð. Men tað varnaðist pápin ikki, fyrr enn hann hevði verið í barnagarðinum eftir soninum og skuldi lova honum inn í bilin.

- Hann skilti ikki, at gentan sat deyð á baksetrinum, sigur ein talsmaður fyri løgregluna við bretska blaðið The Times.

### Annar tilburðurin

Franska blaðið Le Parisien skrivar frá vinfólki hjá manninum, at hann er sera góður við síni børn , men at hann kortini helst verður skuldsettur fyri óætlað manndráp. Læknar hava greitt frá, at Zoe livdi millum tríggjar og fimm tímar, eftir at pápin hevði sett bilin frá sær.

Tilburðurin við trý ára gomlu Zoe var annar tilburðurin av hesum slagnum í Fraklandi teir seinastu átta dagarnar. Í síðstu viku doyði ein tvey ára gamal drongur í bilinum, sum pápin hevði sett frá sær í býnum Pont-de-Chéruy har eysturi í landinum.

Her hevur pápin greitt frá, at hann bleiv órógvaður av einum ferðsluóhappi, og at hann varnaðist einki, fyrr enn hann sá, at ein løgreglumaður royndi at sleppa tí innistongda dronginum til hjálpar. Men tá var ov seint.

# Nýggir múrar eru tann størsti vandin

**Heimurin eigur at standa saman fyri at møta teimum stóru avbjóðingunum so sum yvirgangi, veðurlagsbroytingum og øðrum hóttanum, segði Barrack Obama í røðu síni í Berlin í gjárkvøldið**



Demokratiska forsetavalevnið í USA, Barrack Obama, mælti heimsins fólki til at standa saman, tí júst okkara tíð er tann týdningarmesta fyri heimin, segði hann í røðuni fyri teimum umleið 100.000, sum vóru komin í miðbýin í Berlin at lurta eftir honum í gjárkvøldið.

Obama takkaði Berlin og Týsklandi fyri ta sjáldsomu móttøkuna, sum hann hevði finigð, og hann legði dent á, at hann tosaði sum ein amerikanskur borgari og sum ein felags heimsborgari og ikki sum eitt amerikanskt forsetavalevni.

- Í tí nýggja heiminum hava vit ikki ráð til at verða spjadd, segði Obama og legði afturat, at tann sameindi Berlin er eitt tekin um, at tað ber til at vinna á spjaðing, bara fólk arbeiða saman.

- Tann størsti vandin er, at vit lata nýggjar múrar skilja okkum sundur, segði Barrack Obama við mannfjøldina, sum fagnaði honum við rungandi lógvabrestum.

Í røðimi, sum frammanundan bleiv roknað sum tað uttanríkispolitiska sveinastykkið hjá tí 46 ára gamla senatorinum, nam Obama við søguna hjá týska høvuðsstaðnum og serstakliga leiklutin hjá býnum undir Kalda Krígnum. Í hesum viðfangi nevndi hann, at júst nú eru 60 ár liðin, síðani luftbrúgvin hjá teimum sameindu hjálpti tí avbyrgda fólkinum í Vesturberlin, tá sovjetski herurin stongdi allar vegir til býin.

Undan røðuni vóru fleiri, sum bóru røðuna hjá Obama saman við ta tiltiknu røðuna, sum John F. Kennedey, forseti, helt í Berlin í 1962. Obama brúkti ikki orðini „Ich bin ein Berliner", men hann sett kortini býin í heimsljósið:

- Heimsins íbúgvar - hyggið at Berlin, har søgan prógvaði, at eingin avbjóðing er ov stór til ein heim, ið stendur saman, segði Obama.

## STUTT SAGT

### Kina trýstir Nepal

Tað vóru teir kinesisku myndugleikarnir, sum noyddu myndugleikarnar í Nepal at fara harðliga fram ímóti friðarligum mótmælisgongum hjá tibetbúgvum, sum búgva í Nepal. Teir útlagnu tibetbúgvarnir hava fleiri ferðir skipað fyri mótmælisgongum í nepalska høvuðsstaðnum Katmandu, men sambært mannarættindafelagsskapum hava nepalsku myndugleikarnir tikið fleiri teirra eftir trýsti úr Kina. Millum annað verður sagt, at fleiri av mótmælisfólkunum hava verið fyri kynsligum ágangi í varðhaldinum.

Tað búgva umleið 20.000 tibetbúgvar í Nepal. Talan er um fólk, sum flýddu úr Tibet aftan á tann miseydnaða uppreisturin ímóti Kina í 1959, og eftirkomarar teirra. Sambært mannarættindafelagsskapum eru meiri enn 8.300 tibetbúgvar tiknir í Nepal síðani tann 10. mars.



### Burtur frá Stórtinginum

Ein 33 ára gamal, sum hevur gjørt seg inn á stórtingslimirnar Knut Storberget úr Arbeiðaraflokkinum og Per Sandberg úr Framburðsflokkinum, hevur fingið dóm fyri, at hann skal halda seg burtur frá tinghúsinum í Oslo, skrivar NTB. Rætturin avgjørdi eisini, at maðurin skal ikki seta seg í samband við teir báðar tinglimirnar, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis.

Tann dømdi maðurin er upprunaliga úr Iran, men hevur verið í Noregi í mong ár. Men hann hevur havt ilt við at halda norska lóg, tí síðani 1999 er hann meldaður fyri ikki færri enn 18 lógarbrot.


*Knut Storberget varð álopin í miðbýnum í Oslo*
*Mynd: Aftenposten*